Pól Thorsteinsson er skaddur

Í B36 rokna teir dystirnir ímóti botnliðunum vera góðar møguleikar at lyfta seg aftur móti toppinum

B36-ÍF
Jóannes Hansen

1-1 í Vági verður hildið ikki at vera so galið. Men í B36 ásanna teir, at tað kostar nógv bara at fáa javnleik. Úrtøkan hevur ikki verið nakað at reypa av nógvu tær seinastu ferðirnar. B36 hevur ikki vunnið, síðani teir í triðja umfarinum, sum var á skránni 16. mai, vunnu 3-0 í Gøtu. Tað eru tvey umfør eftir undan summarsteðginum. Um støðutalvan verður nýtt sum barometur, so áttu møguleikarnir at verið góðir fyri at fingið fult báðu ferðirnar. Í morgin skal ÍF vitja í Gundadali. Teir eru næstaftastir. Næsta sunnudag skal B36 vitja á Svangaskarði. B68 er niðast.

Fyritreytirnar hjá B36 versnaðu eitt sindur í Vági. Tá noyddist Pól Thorsteinsson at taka seg av vøllinum. Hann hevur trupulleikar við lærkrikanum. Pól hevur ikki vant í vikuni, hann verður ikki við í morgin, og tað er ivasamt, um hann verður við aftur hesu megin summarsteðgin. Klæmint Matras, sum hevur verið skaddur, kom á vøllin í Vági fyri Pól. Burtursæð frá Pól eru allir hinir í B36 tøkir.

Bartal og Rúni við aftur

Hjá ÍF er tað eitt sindur ivasamt, um Bárður á Lakjuni verður førur fyri at spæla. Møguliga skuldi hann venja í gjárkvøldið. Hann hevur annars ikki vant í hesi vikuni. Bartal Eliasen og Rúni Elttør vóru leikbannaðir, táið ÍF síðsta sunnudag spældi ímóti B68. Teir eru báðir tøkir aftur.

ÍF hevur bara vunnið eina ferð í ár. Tað var í øðrum umfari, táið teir vunnu 4-2 á NSÍ. Eftir javnleikin ímóti B68 varð ásannað, at tað var neyðugt at spæla meiri og sparka minni. Í morgin fæst at síggja, um Sigfriður Clementsen hevur megnað at fingið sítt lið at minnast til hetta, táið hann fer í Gundadal at spæla ímóti B36, sum hann hevur nógv góð minni frá.

Tveir mánaðir síðani KÍ fekk fult

Vágbingar, sum vitja í Klaksvík í morgin, hava fingið tíggju stig burturúr fýra teimum seinastu royndunum

KÍ-VB
Jóannes Hansen

Eyðun Klakstein og hinir í KÍ hava ikki vunnið ein dyst í nærum tveir mánaðar, men sunnudagin kemur VB á vitjan, og tá fara klaksvíkingar at gera enn eina roynd at fáa ein sigur

Tað eru tvey lið, sum gongdin hevur verið púra ólík hjá, sum bresta saman í Klaksvík í morgin. Meðan KÍ ikki hevur fingið fulla úrtøku, síðani teir flaggdagin vunnu 1-0 á B68 í Klaksvík, hevur tað hilnast væl betri hjá vágbingum. Burturúr fýra teimum seinastu umførunum hevur VB fingið tíggju stig.

VB telist millum teirra, sum royna at renna aftaná Skála, og VB er framvegis partur av steypakappingini, har teir um fjúrtan dagar skulu spæla seinnu hálvfinaluna ímóti HB.

Tvey tey seinastu árini hevur tað verið javnt, táið VB hevur vitjað í Klaksvík. Ikki minst í fjør, táið KÍ javnaði við brotssparki í evstu løtu, var tað rættuliga tætt og spennandi.

Hóast VB hevur fingið nógv burturúr seinastu árini, táið teir hava vitjað í Klaksvík, so hava teir ikki vunnið síðani í 1995, táið teir saman við sumbingum vunnu 2-1.

Nógv fólk

VB tykist vera betri fyri við fólki, enn teir hava verið undanfarnu árini. Ímóti B36 var Mindaugas leikbannaður. Hann er tøkur aftur, men nú er Dan Djurhuus leikbannaður. Dalius hevur ikki verið við seinastu ferðirnar, tí hann hevur drigist við sjúku. Hann verður heldur ikki við hesa ferð.

Hjá KÍ var Aleksandar Djordjevic ikki við seinast, tí hann hevði drigist við skaða í rygginum. Leygardagin spældi hann við 2. deildarliðnum í Sandavági, har hann skoraði eitt mál. Hann hevur vant í vikuni, og tað kann hugsast, at hann verður í hópinum, men tað er ivasamt, um hann verður við frá byrjan. Hóast tað leikliga gekk av skriðuni í 1. hálvleiki, so vóru klaksvíkingar sera væl nøgdir við 1-1 ímóti HB í Gundadali síðsta sunnudag, og liðið fer ivaleyst at líkjast tí, sm spældi ímóti HB.

Heimasíðan hjá Norðlýsinum veit at siga, at Elfinn Ørvarodd úr Sandavági var í Klaksvík mánakvøldið og royndarvandi. Hann er vinstrabeintur síðuspælari. Hann hevur ikki verið í Klaksvík síðani mánakvøldið, og tað hevur einki verið at frætt um, um hann skal skifta FS Vágar í 2. deild út við KÍ í 1. deild.

B68 hevur aftur verið í Brasilia

B68 vónar, at nýggi álopsspælarin úr Brasilia skal skjóta málini, sum tað higartil ikki hevur eydnast at fingið. EB/-Streymur hevur ongantíð vunnið á heimavølli ímóti B68

EB/STREYMUR-B68
Jóannes Hansen

Síðsta sunnudag fekk B68 fyrsta stigið í ár. Táið teir í morgin fara á Mølina, hava teir hagtølini við sær soleiðis at skilja, at tær fýra ferðirnar, táið teir hava spælt í landskappingini á Eiði, eru teir hvørja ferð farnir til hús aftur við onkrum. Tríggjar ferðir hevur tað verið javnt, og í 2001 vunnu toftamenn.

Trygvi Mortensen, sum nú venur B68, hevur áður verið venjari hjá EB/-Streymi. Tað er greitt, at bulgarski álopsspælarin, Stanislav Stankov, sum hevur verið vøddaskaddur, verður við í morgin. Stóri spurningurin á Svangaskarði er, um tað fer at eydnast at fáa brasiliumannin Castilho Cardena Anderson á liðið í morgin. 22 ára gamli framrættaði spælarin kom til Toftir í fyrradagin. Hann vandi í fyrrakvøldið og tóktist hava nakað av tí, sum B68 hevur saknað mest av øllum í ár. Á middegi í gjár vóru loyvini ikki komin upp á pláss, men í B68 vónaðu teir tað besta.

Nýggi maðurin, sum verður sagdur at vera skjótur og málsøkin, hevur spælt í Belgia. Inntil síðsta summar spældi hann við FCGeel í bestu og næstbestu deildini. Síðani síðsta summar hevur hann verið í Brasilia. Tað er Jákup í Stórustovu, sum hevur hjálpt til við tí praktiska at fáa brasiliumannin til Toftir.

Bogi Petersen og Mortan Hansen eru rættuliga ivasamir hjá B68. Jákup Eli Olsen, sum hevur verið skaddur, vandi fyrstu ferð aftur hóskvøldið, og Herbert í Lon Jacobsen, sum var leikbannaður ímóti ÍF, er tøkur aftur.

Gongur rætta vegin

Hjá EB/Streymi hava skaðar plágað nógv tað, sum er farið av hesum kappingarárinum. Nú tykist tað ganga rætta vegin. Í gjár roknaðu teir kortini fyri vist, at Pacek verður ikki við í morgin. Hann er framvegis skaddur. Umframt hann er einasta ivamálið Hans Pauli Samuelsen, sum ikki hevur verið førur fyri at venja hundrað prosent í vikuni. Teir vóna kortini, at hann verður førur fyri at spæla.

Fróði Clementsen var sjúkur seinast. Hann hevur vant í vikuni og er tøkur. Marni Djurhuus og Nicu Dogaru hava verið skaðaplágaðir. Teir vórðu báðir skiftir inn ímóti NSÍ. Nú verða teir mettir at vera so mikið væl fyri, at teir kunnu vera við í kappingini um tey fyrstu ellivu plássini.

HB vinnur næstan hvørja ferð

Í meistaraliðnum halda teir tað vera alneyðugt at fáa fulla úrtøku, táið teir í morgin skulu spæla í Gøtu, har heimaliðið støðugt er dottið nærri niðurflytingar strikuni

GÍ-HB
Jóannes Hansen

Í HB hava teir iðrað seg í hesi vikuni. Teir kendu ikki sína vitjunartíð í 1. hálvleiki, táið teir sunnudagin høvdu vitjan av klaksvíkingum. Ta løtuna spældi HB stak væl, teir høvdu fleiri upplagdar málmøguleikar, men teir fingu bara eitt mál, og eftir steðgin vóru teir í longum løtum um ein háls.

Skála fekk fult ímóti GÍ. Harvið fór Skála frá HB í oddastríðnum. Nú skal HB royna seg ímóti gøtumonnum. Og tað er einki sum eitur. Í HB verður tað mett soleiðis, at um teir ikki fáa fult, so fara teir at missa tvey stig, heldur enn at teir fara at vinna eitt.

Hagtølini eru við havnarmonnum. Gulltíðin hjá GÍ endaði í 1996. Síðani tá hevur HB vunnið í Gøtu hvørja ferð burtursæð frá í 2001, táið tað var rumbul í HB leguni.

Hjá HB eru teir tøkir, sum spældu ímóti KÍ. Harafturat er venjarin Heine Fernandez komin fyri seg aftur. Hann hevur vant í hesi vikuni og verður við í morgin. Martin Christiansen hevur verið skaddur. Nú venur hann aftur. Málverjin Bárður Johannesen rokna teir við fer at venja aftur um eina góða viku, táið skinnarin, sum hann hevur havt um fótin, verður tikin av.

Tað hevur ljóðað, at Jan C. Dam skuldi koma úr Danmark at hjálpa HB. Hann hevur ikki enn verið til venjingar, men teir rokna við, at nú fer hann at verða skjótur.

Soltið hjá GÍ

Tað hevur ikki hilnast nakað serligt hjá gøtumonnum. Teir hava ikki fingið fult, síðani teir í øðrum umfari vunnu á Toftum. Tá høvdu teir eftir tvey tey fyrstu umførini fulla úrtøku. Síðani hava ter í fimm umførum fingið tvey stig.

Ímóti Skála varð Atli Gregersen vístur av vøllinum. Hann er leikbannaður í morgin. Ivaleyst verður Kaj Ennigarð eitt evni til miðverjuplássið. Áslakur R. Petersen var ikki við á Skála, tí hann hevði verið skaddur. Hann hevur vant alla vikuna.

Fyrireikingarnar hava alt at siga

Í Róðrarsambandinum verður ásannað, at kappróðurin síðsta leygardag hevur havt við sær, at fyrireikingarnar til róðurin í Hvalvík hava verið uppaftur neyvari, enn tær annars høvdu havt verið

FM KAPPRÓÐUR
Jóannes Hansen

Manningin á Argjabáinum skal royna at halda fram við sigursrøðini hjá sær á Sundalagsstevnuni
Savnsmynd

Tríðja FM kappingin í kappróðri verður seinnapartin í dag. Kappast verður í Hvalvík. Saman við Streymnesi er Hvalvík vertur fyri Sundalangsstevnuni og harvið FM kappróðrinum tríðja hvørt ár.

Síðsta leygardag varð róð á Skálafjørðinum. Tað spældi einki serligt av. Róðurin var ikki liðugur fyrrenn klokkan var knapt sjey. Í Róðrarsambandinum og í Hvalvík/Streymnesi vóna teir, at tað ikki fer at verða soleiðis seinnapartin í dag.

– Vit royna altíð at fyrireika okkum so væl, sum tað ber til. Men tað skerst ikki burtur, at óhepna gongdin í róðrinum síðsta leygardag hevur havt við sær, at vit í RSF saman við lokalu fyrireikarunum har norðuri hava verið uppaftur meiri tilvitaðir um, at alt skal klappa, enn vit kanska høvdu havt verið, staðfestir Hannis Joensen, formaður í Róðrarsambandinum.

Sigur tú harvið, at tit ikki fyrireika tykkum so væl, sum tað ber til, á øllum stevnunum?

– Avgjørt ikki. Undan Norðoyastevnu hava vit fund við allar stevnufyrireikararnar, allar dómararnar, og vit bjóða umboðum fyri allar manningarnar at vera við til kunnandi fund, har alt í sambandi við kappróðurin verður gjøgnumgingið, og har tað er høvi at seta spurningar og tosa um tingini. Harafturat hava vit samband við lokalu fyrireikararnar í vikuni undan róðrinum. Tað, sum eg sigi, er, at vit í hesi vikuni hava havt samband við og gjøgnumgingið viðurskiftini og allar møguligar spurningar og støður uppaftur meiri gjølla, enn vit kanska høvdu havt gjørt, um tað hevði gingið soleiðis á Skálafjørðinum, sum vit høvdu roknað við.

Bíða eftir frágreiðingum

Fyrr í vikuni varð sagt, at Róðrarsambandið í hesi vikuni fór at viðgera róðurin á Eystanstevnuni. Tá ið vit fregnast hjá formanninum í Róðrarsambandinum um, hvat teir eru komnir til, svarar hann, at teir eru ikki lidnir at viðgera spurningin.

– Vit hava tosað við teir, sum vóru við til at fyrireika. Vit hava biðið teir um skrivliga frágreiðing um, hvussu teir upplivdu henda dagin. Tað er sera týdningarmikið fyri viðgerðina og ikki minst fyri eftirtíðina og tí, sum kann lærast av sovornum, at tað fyriliggur skrivligt tilfar. Men vit hava ikki fingið skrivligar frágreiðingar frá startdómaranum og frá lokalu fyrireikarunum. Í eru vit ikki lidnir at viðgera málið, sigur Hannis Joensen. Hann var ikki sjálvur á Skálafjørðinum síðsta leygardag. Hann var í Danmark og róði kapp við einum gomlum Havnarbáti.

Tá ið formaðurin í RSF sigur, at tað er týdningarmikið fyri allar partar, at málið verður væl og nágreiniliga lýst, so er neyvan nakar ósamdur við honum í hesum. Og tad man eisini vera sjálvfylgja, at lærdómurin verður lýstur alment. Tað vil siga í miðlunum, sum nýta tíð og orku til at fylgja við.

– Vit hava aftur og aftur undirstrika, at tað skal ansast væl eftir, at tíðin verður hildin. Tað vil siga, at startdómarin fer undir fyrireikingarnar til næsta róðurin, tá ið startskotið er farið. Tað skal helst vera soleiðis, at tað bara verður bíðað eftir høvuðsdómaranum og útvarpsbátinum. Sjálvandi kann tað orsaka av veðri og vindi verða neyðugt at nýta fimm minuttir eyka at leggja bátarnar. So skulu teir minuttirnir brúkast. Men tað skulu ikki vera aðrar orsøkir til, at róðurin verður seinkaður, er tað, sum Hannis Joensen sum heild vil siga um róður og róðrarfyrireiking.

FM í eygsjón

Hóast tað í dag er triðja av sjey FM kappingum, sum er á skránni, so kann tað skjótt koma har til, at onkrir bátar við sigri í dag fara at hóma FM heitið í havsbrúnni.

Tríggir bátar hava vunnið bæði á Norðoyastevnu og á Eystanstevnu. Talan er um kvinnurnar umborð á Jarnbardi, Argjabátin og so Havnarbátini. Hóast fjarstøðan ikki í øllum kappingunum hevur verið so stór til teir næstu í røðini, so hava sigrarnir hjá øllum hesum trimum í báðum kappingunum verið sannførandi.

Í hinum trimum kappingunum var annar vinnari á Skálafjørðinum, enn tað var í Klaksvík. Í dreingjaróðrinum vann Spógvin í Klaksvík og Blikur á Skálafjørðinum. Í genturóðrinum vann Sílið í Klaksvík og Blikur í Runavík, og í kappingini millum 6-mannafør við monnum vann Sundabáturin í Klaksvík og Jarnbardur í Runavík.

1000 startmetra málið í Hvalvík er sunnanfyri Toftadalsoyra. 1500 metra startmálið er út fyri Stórumøl, og 2000 metra startmálið er út fyri Skarvsoyra.

Teir, sum kenna til viðurskiftini og umstøðurnar í Hvalvík, siga, at hóast tað norðuri við brúnna um Streymin kann tykjast sum um, at streymurin er harður og ger nógv um seg, so er hetta eingin trupulleiki í Hvalvík. Har verður sagt, at tað er streymloysi.

Lítil føroysk úrtøka

Fram fekk einki og er niðanfyri strikuna, og ÍA misti tríðja plássið, tá ið teir spældu javnt

ÍSLAND
Jóannes Hansen

Tað gekk einki serligt hjá feløgunum við føroyskum spælarum, tá ið sætta umfarið í Landsbankadeildini varð avgreitt mikukvøldið.

Størst var vónbrotið hjá Fram, sum Fróði Benjaminsen og Hans Fróði Hansen spæla við, og sum Ion Geolgau er venjari hjá. Hesa ferð høvdu teir á Laugardalsvøllinum vitjan av KA av Akureyri, sum undan uppgerðini við Fram var næstniðast á talvuni.

KA vann 1-0. Málið fingu teir, tá ið eitt korter var eftir. Talan var um fint langskot. Fram hevði bóltin mesta partin av tíðini, og sambært heimasíðuni hjá felagnum høvdu teir nógv fleiri møguleikar, men tað eydnaðist teimum ikki at skjóta mál.

Eftir at KA hevði fingið mál, skifti Fram tríggjar spælarar út. Ein teirra var Fróði Benjaminsen, sum heimasíðan ikki heldur hava verið so eyðsýndan seinastu ferðirnar, sum hann var í fyrstu umførunum.

Eftir heimatapið mikukvøldið er Fram næstaftast. Harvið eru teir komnir í ta støðuna, sum teir hava verið á nógvu tey seinastu árini. Fram legði annars sera bragdliga fyri í hesum kappingarárinum.

Julian Johnsson og ÍA høvdu mikukvøldið vitjan av FH. Gestirnir vóru á odda 1-0 og 2-1, men heimaliðið megnaði báðu ferðirnar at koma afturíaftur. ÍA er nú á fjórða plássinum. Teir mistu tríðja plássið til ÍBV. ÍBV vann ikki minni enn 4-0, tá ið Keflavík vitjaði í oyggjunum. Keflavík er annars næstfremst.

Fylkir vardi oddasessin, tá ið teir á heimavølli vunnu 2-1 á botnliðnum Víkingi. Albert Sævarsson helt tætt í málinum hjá Grindavík, men tað spurdist bara eitt stig burturúr, tí liðfelagarnir hjá honum megnaðu ikki at skora ímóti meistaraliðnum KR.

Mánakvøldið skal Fram spæla á útivølli ímóti KR, og mikukvøldið skal ÍA spæla á útivølli ímóti Keflavík.

Íslendska Landsbankadeildin

	d	v	j	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Fylkir	6	4	2	0	9	3	6	14
2 Keflavík	6	3	1	2	7	9	-2	10
3 ÍBV	6	2	3	1	10	6	4	9
4 ÍA	6	2	3	1	7	5	2	9
5 FH	6	2	3	1	7	6	1	9
6 KR	6	2	2	2	6	7	-1	8
7 Grindavík	6	1	4	1	5	6	-1	7
8 KA	6	2	1	3	5	6	-1	7
9 Fram	6	1	2	3	7	8	-1	5
10 Víkingur R	6	0	1	5	3	10	-7	1

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (ÍA), Fróði Benjaminsen og Hans Fróði Hansen (Fram)

Tað verður spennandi í Gøtu

Verður hugt at hagtølunum, so tykis størsti ivin vera um, hvørt tað verða HB ella GÍ, sum skulu taka stigini í Gøtu sunnudagin. Her hevur HB eitt pinkalitið søguligt yvirtak við fimm siguri móti teimum fýra hjá GÍ.

Í hinu dystunu tykjast hagtølini benda hampuliga greitt annan vegin. Klárast í Havn, har ÍF ikki hevur fingið stig seinastu tíggju árini, og eisini í Runavík, har NSÍ hevur vunnið tær báðar ferðirnar, sum Skála hevur vitjað í bestu deildini. Hinvegin er tað tó ein sannroynd, at hagtøl ikki man vera tað, sum teir hjá Skála leggja mest í hetta kappingarárið.

Á Eiði hevur B68 havt tað tungt, men enn hava teir so ikki tapt dyst har, og í Klaksvík plagar ofta at ganga sera javnt á, tó at KÍ helst hevur størru orsøkina til optimismu í hesi uppgerðini.

Talvan niðanfyri sýnir, hvussu tað hevur tørnað út, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava hitst í tilsvarandi uppgerðunum seinastu tíggju árini.

Og so skal tað viðmerkjast, at dysturin, NSÍ-Skála, ikki verður leiktur fyrr enn mikudagin.

-jm

	03	02	01	00	99	98	97	96	95	94	Í alt	
B36-ÍF	-	-	-	-	4-2	7-2	8-3	4-0	-	2-1	5-0-0	25-8
GÍ-HB	0-4	3-4	3-2	1-2	1-2	1-3	1-1	5-1	2-1	4-1	4-1-5	21-21
EB/S-B68	2-2	3-3	1-2	-	-	-	-	-	-	0-0	0-2-1	6-7
KÍ-VB	2-2	0-0	4-1	2-2	2-1	2-1	3-2	2-2	1-2	-	4-4-1	18-13
NSÍ-Skála	2-0	3-1	-	-	-	-	-	-	-	-	2-0-0	5-1